Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 31.10.2019 kl. 18:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir:: | Jóhan Christiansen<br>Brandur Jacobsen<br>Árni Jacobsen<br>Hjalti Dalheim<br>Tollakur Joensen<br>Hans Mourits Foldbo<br>Gudny Langgaard<br>Uni Rasmussen<br>Hanna Jensen |
| Vara limir: | |
| Ikki møtt: | Brandur Jacobsen var ikki við til viðgerðina av málunum 19/00498, 19/00511 og 19/00557 |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |

| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 73/19 | 19/00498-2 | Tilmæli - Umsókn um keyp av parti av matr. nr. 147af og 147d í Leirvík | 3 |
| 74/19 | 19/00511-10 | Tilmæli - Umsókn um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 339i LV | 5 |
| 75/19 | 19/00557-2 | Tilmæli - Umbøn um ummæli í samband við marknaumskipan matr. nr. 90 og 9 í SG | 6 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 76/19 | 19/00561-1 | Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 19/00561 - Umbøn um eykajáttan til konto 320 – børn við serligum tørvi | 7 |
| 77/19 | 19/00055-11 | Mál 19/00055 Beding í Eysturkommunu. Málslýsing og tilmæli | 9 |
| | | | |

# 73/19 Tilmæli - Umsókn um keyp av parti av matr. nr. 147af og 147d í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.10.2019 | 28/19 | 19/00498-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.10.2019 | 64/19 | 19/00498-2 |
| 3 Býráðið | 31.10.2019 | 73/19 | 19/00498-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Umsitingin hevur móttikið umsókn um keyp av lendi í Leirvík.<br><br>Umsøkjarin skrivar:<br>*"Vísindi til, at vit hava keypt húsini á Garðsvegi 21 í Leirvík, loyva vit okkum við hesum at søkja um at keypa 6 m av matrikul 147af niðaneftir. Eisini ynskja vit at keypa nakað av lendi suðureftir av matrikul 147d, sum víst á tekningini, fyri at rætta markið upp. Orsøkin til hetta er, at vatn lekur inn í húsini frá í erva av, og somuleiðis er tað so mikið vátt sunnanfyri húsini, at garðurin er koppaður. Um okkara umsókn verður gingin á møti er ætlanin at drena økið, soleiðis at vatnið rennur frá stykkinum. Síðani er ætlanin at gera garð sunnan- og omanfyri húsini, planta trø framvið og evt. brúka økið omanfyri til parkeringspláss."*<br><br>Tekniska umsiting hevur viðgjørt umsóknina, og er komin fram til at tað sambært býarplaninum, bert er møguligt at keypa 4 metrar av matrikkul 147af, hetta tí at hesin partur liggur í øki B: Bústaðarøki, meðan tað, sum er omanfyri liggur í øki H: Fríøki.<br><br>Ein fyrrverandi ánari av sama matrikkli, hevur aður søkt um at keypa burturav matr.nr. 147af. Víst verður til mál nr. 13/00461. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at selja 4 metrar, sum omanfyri nevnt og økið sunnanfyri, fyri at rætta markið upp. |

**Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevnd 18. oktober 2019**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at selja 3 metrar niðaneftir í norðara enda og áleið 4 metrar niðaneftir í sunnara, breiddin er 19,5 metrar.
Víst verður til skjal, sum eitur "*keyp av lendi - Mál nr. 19.00498".*

**Viðtøka Fíggjarnevnd 24. oktober 2019**
Mæla til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini

**Viðtøka Býráðið 31. oktober 2019**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 74/19 Tilmæli - Umsókn um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 339i LV

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.10.2019 | 29/19 | 19/00511-10 |
| 2 Býráðið | 31.10.2019 | 74/19 | 19/00511-10 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Ánari av matr. nr. 339i í Leirvík hevur søkt um frávik frá byggilinjuni móti gongugøtuni, ið er síðuliggjandi matr. nr. 339i.<br><br>Umsøkjarin skrivar:<br>"*Byggiloyvi til matr. 399i*<br>*Eg vil hervið søkja um byggiloyvi til sethús á matr 399i í Leirvík*<br>*Ein trupuleiki er at húsini ið vit ætla okkum eru ov stór at passa á grundstykkið.*<br>*Frástøðan til markið í tí eina horninum er 1,6 metur.*<br>*Ímillum mítt stykki oggrannan er ein vegur, og tí meti eg ikki at tað er til nakran ampa um húsini eru nakað nærri markinum enn 2,5 metur.*<br>*Kunnu vit fáa undantak til at byggja húsini 1,6 metur frá eystara marki?* "<br><br>Av tí at ein gøta, sum er 3 metur breið liggur millum matr. nr. 339i og 339k, ávirkar tað ikki fráleikakravið viðv. bruna, sum er 5 metur millum sethús. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at ganga umsókn um frávik á møti. |

### Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevnd 18. oktober 2019
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til ganga umsókn um frávik á matr. nr. 339i í Leirvík á møti.

### Viðtøka Býráðið 31. oktober 2019
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 75/19 Tilmæli - Umbøn um ummæli í samband við marknaumskipan matr. nr. 90 og 9 í SG

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.10.2019 | 31/19 | 19/00557-2 |
| 2 Býráðið | 31.10.2019 | 75/19 | 19/00557-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Umsitingin hevur móttikið umbøn um ummæli frá umhvørvisstovnuni viðv. marknaumskipan á matr. nr. 90 og 9 í Syðrugøtu.<br>Ánari av matrikkul nr. 90 ynskir at keypa 30 fermetrar frá matrikkul nr. 9.<br><br>Eysturkommuna skal ummæla hetta. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at viðmæla nevndu marknaumskipan. |

**Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevnd 18. oktober 2019**
Byggi – og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Viðtøka Býráðið 31. oktober 2019**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## <u>76/19 Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 19/00561 - Umbøn um eykajáttan til konto 320 – børn við serligum tørvi</u>

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 14.10.2019 | 12/19 | 19/00561-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.10.2019 | 65/19 | 19/00561-1 |
| 3 Býráðið | 31.10.2019 | 76/19 | 19/00561-1 |

**Málslýsing:**

Vit koma at hava ein munandi meirnýtslu á konto *320 – børn við serligum tørvi* enn avsett er á fíggjarætlanini 2019

Á fíggjarætlanini 2019 er avsettar kr. 400.000 á nevndu konto. Vit hava havt rímiliga stórar avbjóðingar fyrra hálvár, í mun til børn við serligum tørvi – bæði á Gjáa og Brúsa. Umframt hetta, so eru nakrir tímar eisini játtaðir til børn við serligum tørvi í ganga í Skúlaspíranum og Frítíðarheiminum.

Hetta hevur gjørt, at vit hava brúkt fram til ultimo september kr. 455.146,10 av teimum játtaðu kr. 400.000
Eftir summarferiuna hevur tað víst seg, at vit hava fingið enn fleiri børn inn, sum hava serligan tørv og hevur hetta sostatt viðført, at við havi fingið eina munandi meirútreiðslu á konto 320 – *børn við serligum tørvi* .

Tørvur er á eini eykajáttan á kr. 400.000

| | |
|---|---|
| **<u>Ætlan 2019</u>** | kr. 400.000,00 |
| Brúkt sept 2019 | kr. 455.146,10 |
| Meirnýtsla | kr. 55.146,10 |
| Væntað forbrúk oktober, november og desember 2019 | kr. 342.777,85 |
| | |
| **Mett eykajáttan** | **397.923,95** |

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til at eykajáttan verður gjørd á kr. 400.000

**<u>Viðtøka Trivnaðarnevndin 14. oktober 2019</u>**
Trivnaðarnevndin mælir til at eykajáttan verður gjørd á kr. 400.000

**Viðtøka Fíggjarnevnd 24. oktober 2019**
Mæla til at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini

**Viðtøka Býráðið 31. oktober 2019**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini og fíggjarnevndini. Peningurin verður tikin av innistandandi.

## 77/19 Mál 19/00055 Beding í Eysturkommunu. Málslýsing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 14.01.2019 | 4/19 | 19/00055-11 |
| 2 Vinnunevndin | 14.02.2019 | 8/19 | 19/00055-11 |
| 3 Fíggjarnevnd | 20.02.2019 | 13/19 | 19/00055-11 |
| 4 Byggi - og býarskipanarnevnd | 16.05.2019 | 18/19 | 19/00055-11 |
| 5 Vinnunevndin | 17.09.2019 | 31/19 | 19/00055-11 |
| 6 Vinnunevndin | 14.10.2019 | 34/19 | 19/00055-11 |
| 7 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.10.2019 | 32/19 | 19/00055-11 |
| 8 Fíggjarnevnd | 24.10.2019 | 63/19 | 19/00055-11 |
| 9 Býráðið | 31.10.2019 | 77/19 | 19/00055-11 |

**Málslýsing:**

Kostnaðarmeting fyri bátadrátt í Loynikrókinum í Leirvík fyrilá innan fíggjarætlanararbeiðið 2019 fór gongd. Býráðið hevur sett 1.700.000 kr. av til verkætlanina í 2019.

**Ískoyti 13-05-2019**

Verkætlanin er klár at bjóða út. LBF hevur gjørt útbjóðingartilfarið klárt og kemur at standa fyri hesum.

**Ískoyti 9. oktober 2019**

Lisitatión var 20. august 2019 og lægsta boð fyri, anleggs- og betongarbeiði og El-arbeiði bleiv 1.801.851,59 kr. Aftaná hava vit tó fingið staðfest, at dýpið har sum bátadrátturin skal verða er væl djúpri enn áður mett. Av hesi orsøk skal meira tilfar til, og sostatt verður ein meirkostnaður. Fyritøkan sum vann útbjóðingina er sostatt komin við einum nýggjum tilboðið á 2.069.036,60.

Kostnaðarmetingin fyri stálarbeiðið er áleið 828.000 kr.

Sostatt verður samlaði kostnaðurin:

| | |
|---|---|
| Anleggs- og betongarbeiði og El-arbeiði: | 2.198.351,39 (v/6,25% mvg) |
| Stálarbeiði: | 879.750,00 (v/6,25% mvg) |
| Tls.: | 3.078.101,39 + Ráðgeving |

**Fíggjarligar avleiðingar:**

1.700.000 kr. er sett av til verkætlanina í fíggjarárinum fyri 2019. Endaligu kostnaðurin verður staðfestur, tá tilboðini koma inn.

**Tilmæli**

Mælt verður til at bjóða verkætlanina út.

## Viðtøka Vinnunevndin 14. januar 2019

Vinnunevndin mælir til, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum, og at málið verður neyvari lýst, bæði við ábyrgd og tekningum, til komandi fund í Vinnunevndini.

**Viðtøka Vinnunevndin 14. februar 2019**
Vinnunevndin mælir til at verkætlanin verður bjóða sum ein samla verkætlan.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 20. februar 2019**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini

**Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevnd 16. maj 2019**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at bjóða alla verkætlanina út, sum eina arbeiðstøku.

**Viðtøka Vinnunevndin 17. september 2019**
Málið tikið av skrá.

**Viðtøka Vinnunevndin 14. oktober 2019**
Samlaða upphæddin fyri verkætlanina við 10% í óvæntaðum og ráðgeving er mett at verða 3.386.571 kr. Hanna Jensen og Gudny Langgaard mæla til at arbeiðið verður gjørt og neyðug upphædd verður játtað til verkætlanina.
Hjalti Dalheim tekur støðu til málið á býráðsfundinum.

**Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevnd 18. oktober 2019**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at seta arbeiðið í gongd, og at írestandi upphædd verður sett av til fíggjarætlan 2020.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 24. oktober 2019**
Jóhan Christiansen mælir til at taka undir við tilmælinum hjá Byggi – og býarskipanarnevndini.
Hjalti Dalheim tekur støðu til málið á býráðsfundinum

**Viðtøka Býráðið 31. oktober 2019**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og byggi- og býarskipanarnevndini.

fundurin lokin kl. 19.00

_________________________
Jóhan Christiansen

_________________________
Brandur Jacobsen

_________________________

_________________________

Árni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Tollakur Joensen

Hans Mourits Foldbo

Gudny Langgaard

Hanna Jensen

Uni Rasmussen